BARNA- OG ÚTBÚGVINGARMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
110 Tórshavn

14. januar 2026
Mál: 22/22133-149
Viðgjørt: HW

Svar

upp á

skrivligan fyrispurning nr. 52-065/2025, eftir § 52a í Tingskipanini, frá Anniku Olsen, løgtingskvinnu, settur Djóna Nolsøe Joensen, landsstýrismanni í barna- og útbúgvingarmálum, um námsfrøðingar fulla tíð í fólkaskúlanum.

Spurningurin er soljóðandi:

1. Er ætlanin at seta námsfrøðingar fulla tíð í fólkaskúlanum?
2. Um ja, nær kann hetta setast í verk?
3. Um allir námsfrøðingar í fólkaskúlanum ikki kunnu setast fulla tíð beinanveg, er tað so eitt fyrsta stig at byrja við serstovunum?
4. Er ætlanin at taka Føroya Pedagogfelag við í arbeiðið hjá Fólkaskúlaráðnum um støðuna hjá námsfrøðingunum í fólkaskúlanum?

Svar

Til 1: Ja, ætlanin er at arbeiða fram ímóti, at námsfrøðingar verða settir fulla tíð í fólkaskúlanum, har fyrsta stig er at lyfta starvsbrotið hjá námsfrøðingum í serflokkum upp á 1,0.

Til 2: Landsstýrismaðurin tekur hetta málið í størsta álvara og vil seta tað í verk skjótast gjørligt. Barna- og útbúgvingarmálaráðið hevur arbeitt við hesum málinum, og í løtuni eru vit í samskifti við Fíggjarmálaráðið um, hvussu vit í fyrstu atløgu kunnu fáa námsfrøðingar í serflokkum í fólkaskúlanum upp á fulla tíð. Endamálið er at fáa námsfrøðingar í serflokkum í fólkaskúlanum upp á fult starv so skjótt sum til ber.

Til 3: Ja, tað er heilt avgjørt ætlanin at byrja við námsfrøðingunum, sum starvast í serflokkunum, tí her hava námsfrøðingar ein serliga týdningarmiklan leiklut.

Í serflokkum snýr arbeiðið seg í stóran mun um at tryggja trivnað, menna relatiónir og stuðla undir persónliga og sosiala menning hjá næmingunum – og hetta eru júst kjarnuøki, har námsfrøðingar hava serligan fakligan førleika.

Trivnaður og tryggleiki eru grundleggjandi fortreytir fyri, at næmingarnir yvirhøvur fáa gagn av undirvísingini.

Í verki arbeiða námsfrøðingar og lærarar í serflokkunum tætt saman, tvørfakligt og við felags ábyrgd fyri næmingunum. Tí er tað sera umráðandi, at námsfrøðingar fáa eina greiða og rættvísa arbeiðstíðaravtalu, sum tekur hædd fyri teirra týdningarmikla leikluti og dagliga arbeiði.

Til 4: Fólkaskúlaráðið hevur viðgjørt støðuna hjá námsfrøðingum í fólkaskúlanum, eitt nú starvsnormeringar hjá námsfrøðingum í serflokkunum og í fólkaskúlanum sum heild.

Í hesum sambandi hevur Føroya Pedagogfelag luttikið á fundi í Fólkaskúlaráðnum, har Pedagogfelagið fekk høvi at leggja fram síni sjónarmið, umframt at spurningar og ivamál vóru umrødd.

Landsstýrismaðurin hevur avgjørt at taka hetta málið upp til viðgerðar í Fólkaskúlaráðnum út frá tí ásjón, at tað hevur alstóran týdning at fáa lýst og greina støðuna hjá námsfrøðingum í fólkaskúlanum, soleiðis at námsfrøðingar skjótast gjørligt fáa greið og vælskipað arbeiðsviðurskifti í fólkaskúlanum, bæði í mun til ábyrgd, leiklut, arbeiðsuppgávur, fyrireiking, førleikamenning og starvsnormering.

Vinarliga

Djóni Nolsøe Joensen
landsstýrismaður